tí var tað rætt av mær at halda fram við stríðnum, sigur Benazir Bhutto, sum tá gjørdist fyrsti kvinnuligi leiðarin í einum muslimskum landi, bert 35 ára gomul - Í mínum hugaheimi var ongin ivi um, at eg kundi gerast forsætisráðharri, hóast eg var kvinna. Eg hevði sæð tað aðrastaðni, á Sri Lanka, Í India, Í Ísrael og í Bretlandi.

Og hon greiðir frá, at tá ið hon fyrstu ferð varð vald, kendist tað, sum at verkið var fullgjørt, og at tey sum vóru deyð í stríðnum, nú kundu hvíla í friði. So nógv fólk vóru deyð pínd, hongd og revsað alment undir hernaðarstýrinum, ið eisini hevði lívið hjá pápanum á samvitskuni.

- Sigur mín var teirra sigur, tí tey gingu á odda fyri demokratinum, sigur Beanzir Bhutto.

### Tungi arvurin

Benazir Bhutto var alla tíðina varug við týdningin av leikluti-num sum fyrimynd fyri aðrar kvinnur.

- At eg gekk á odda merkti, at aðrar kvinnur kundu stríðast fyri líkarætti og virðing. Tí kenni eg stóra ábyrgd fyri øðrum kvinnum og vil, at kvinnur skulu hjálpa hvørja aðrari, sigur Bhutto. Tí var eisini upplagt hjá henni, at hava sum fremsta mál at modernisera Pakistan.

Í samrøðuni við DR frá 2005 er hon stødd í Dubai, har hon búi í útlegd, og gjørdi seg til reiðar at koma heim aftur til landið í 2007, til valið, sum eftir øllum at døma verður í januar.

- Eg vil stríðast móti terrorismu, reinsa landið fyri hernaðarstýrið, muturgølur og religiøsari fundamentalismu. Eg vil steðga hesari maskinuni, sum framleiðir hatur. Fólk í landi mínum drepa landið búskaparliga, og hetta ger, at tey hava ikki ráð til at liva. So siga teir: farið og gerið sjálvmorðsatsóknir, so skulu vit rinda tykkum pening afturfyri. Tí óttist eg fyri, at Pakistan dettur sundur, bæði fíggjarliga og sosialt, segði Benazir Bhutto í samrøðuni við donsku sjónvarpsstøðina DR í 2005.

Pakistanski andstøðuleiðarin, dóttirin úr eysturi, gjørdist enn eitt offur fyri religiøsari fundamentalismu – í sama býi, har hon gav pápanum lyftið um at lyfta arv hansara. Kanska fara pakistansku kvinnurnar at lyfta arv hennara?

# Al-Qaeda gav boðini um morðið á Benazir Bhutto

**Tað sigur leiðarin í asiatisku deildini hjá al-Qaeda, Mustafa Abu al-Yazid, sum eisini er talsmaður hjá yvirgangsfelagsskapinum**

ÚTLAND

*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

- Vit gjørdu enda á tí týdningarmesta amerikanska leigusveininum, sum hevði svorið at fara í hernað ímóti tí heilaga stríðnum. Hetta var ein stórur sigur fyri okkum, sigur Mustafa Abu al-Yazid í telefonsamrøðu við blaðið Asia Times.

Talsmaðurin, sum eisini er ovasti fyri asiatisku deildini hjá al-Qaeda, sigur við Asia Times, at tað vóru limir í einum felagsskapi í Punjab, og sum virkar sum deild hjá al-Qaeda, sum myrdu Benazir Bhutto í gjár.

- Hetta er okkara størsti sigur á teimum, sum eru í parti við Vesturheiminum, sigur Yazid við Asia Times. Blaðið sigur seg hava fingið ábendingar um, at morðið í gjár var tann fyrsti liðurin í einari ætlan, sum hevur til endamáls at beina fyri teimum í Pakistan, sum fjeppast uppi í amerikanarunum. Ein á listanum sigst vera Pervez Musharaf, forseti, skrivar Asia Times.

### Altjóða fordøming

Úr øllum ættum bleiv morðið á Benazir Bhutto hvassliga fordømt, og leiðarar um allan heim heittu á pakistanska fólkið um ikki at leypa framav.

- USA fordømir hvassliga hesa níðingsgerð, sum vísir, at tað eru víðgongdar kreftir í Pakistan, sum royna at forkoma landsins demokratii, segði George W. Bush, forseti, millum annað í sínari viðmerking.

- Vit fordøma hesa yvirgangsgerð við okkara hvassastu orðum, og vit hava samkenslu við teimum, ið mist hava, segði talsmaðurin hjá russiska uttanríkisráðnum, Mikhail Kamjnin.

Franski uttanríkisráðharrin, Bernard Kouchner, segði seg eisini hava samkenslu við teimum avvarðandi.

- Vit fordøma hesa yvirgangsatsókn, og vit minnast frú Bhutto sum ein stóran einstakling í pakistonskum politikki, segði franski uttanríkisráðharrin. Danski starvsbróðir hansara, Per Stig Møller, fordømdi eisini morðið og segði tað vera eina hóttan ímóti friðinum.

### Val sum ætlað

Eygleiðarar høvdu væntað, at morðið á Benazir Bhutto fór at fáa Pervez Musharaf, forseta at útseta ella avlýsa tjóðartingsvalið tann 8. januar, men í morgun varð kunngjørt, at valið verður sum ætlað.

- Valið verður tann 8. januar sum fyrr fráboðað, segði virkandi forsætisráðharrin, Mohammadmian Soomro, við fjølmiðlarnar í morgun.

Andstøðupolitikarin Nawaz Sharif segði í gjár, at hansara flokkur fer at boykotta valið, men eygleiðarar ivast í, um flokkurin kortini fer at gera tað. Teir vísa á, at Sharif hevur svorið at halda fram við stríðnum hjá Benazir Bhutto fyri demokratii og semju, og at hann tí illa kann boykotta valið.

### Benazir Bhutto

- Benazir Bhutto varð borin í heim í Karachi í 1953. Útbúgvin í Bretlandi og USA.
- Tók í 1982 við sum formaður í Pakistan People's Party.
- Sat javnan í húsavarðhaldi frá 1979 til 1984, men slapp so at flyta til Evropa.
- Vendi heim aftur í 1986.
- Varð í 1988 vald til forsætisráðharra sum tann fyrsta kvinnan í einum muslimskum landi.
- Varð koyrd frá í 1990 orsakað av skuldsetingum um korrupsjón og valdsmisnýtslu.
- Í 1993 fekk Pakistan People's Party aftur meiriluta, og Benazir Bhutto gjørdist aftur forsætisráðharri.
- Koyrd frá í 1996 eftir skuldsetingar um korrupsjón og vánaliga embætisførslu.
- Í 1999 dømdi ein dómstólur í Sveis Benazir Bhutto og mann hennara, Ali Zardani, í fongsul í seks mánaðir, og at tey skuldu endurrinda pakistanska ríkiskassanum11 mió. dollarar
- Fór í útlegd í 1999 og vendi ikki heim aftur fyrr enn í oktobur í ár.



*Viðhaldsfólk bera kistuna hjá Benazir Bhutto frá sjúkrahúsinum í Rawalpindi*